# Eitt ársmøti at samansjóða fólkið

**Ársmøtið hjá Heimamissiónini savnar í túsundatali av yngri og eldri fólki í Leguhúsinum í Nesvík. Umframt møtir og bíbliutímar verður arbeiðið í rørsluni somuleiðis viðgjørt við pallborði og frágreiðingum**

SAMKOMUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Leguhúsið í Nesvík verður karmur um ársmøtið hjá Heimamissiónini, har missiónsvinir úr øllum landinum seta hvørjum øðrum stevnu um vikuskiftið*

**Nesvík:** Sangmøti við vitnisburði er fyrsta tiltakið á ársmøtinum, sum Heimamissiónin fer at skipa fyri um vikuskiftið.

Ársmøtið 2005 byrjar við møti í kvøld kl. 19:30 í Leguhúsinum í Nesvík, og síðani verður hildið á allar dagarnar fram til sunnukvøldið, tá seinasta tiltakið er á skránni.

Heitið fyri møtini hesaferð er »Missión – ein avbjóðing« og verður tað lýst við talum, sangi, framløgum og eisini einum pallborðsfundi.

Fólk úr øllum landinum plaga at koma til hesi ársmøtini hjá Heimamissiónini, sum hevur meiri enn 100 ár á baki her á landi.

Kring oyggjar okkara ger Heimamissiónin eitt andaligt arbeiði millum børn, ung og tilkomin. Eingin er limur í Heimamissiónini, men hinvegin kann vísast á, at málgagnið hjá rørsluni – Trúboðin – kemur út í 2000 eintøkum hvørja ferð.

## Samansjóðing

Heimamissiónin er ein rættiliga virkin rørsla, og hevur m.a. sunnudagsskúlar á 50 støðum kring oyggjarnar.

Møtir verða eisini hildin regluliga á mongum støðum. Og fyri líkasum at samansjóða alt hetta arbeiðið verður júst hetta eitt av evnunum á ársmøtinum í ár.

Seinnapartin fríggjadagin verður nevniliga ein pallborðsfundur, har spurningurin um, hvussu ein samansjóðar eina so stóra og víttfevnda rørslu sum Heimamissiónina, verður tikin fram.

Við pallborðið fara at sita Hilda Viderø, Laila Højgaard, Thomas Dam og Christian Joensen.

Eitt annað áhugavert evni á ársmøtinum er frágreiðingar frá teimum mongu ymisku arbeiðsgreinunum hjá rørsluni. Hetta verður gjørt seinnapartin leygardagin, har eisini formansfrágreiðing og fíggjar-frágreiðing er á skránni, eins og samrøður verða hildnar við umboð fyri tríggjar av arbeiðsgreinunum.

## Gleðiboð

Ein annar partur av hesum tiltakinum, sum savnar í túsundatali av fólki, eru møtini um kvøldarnar.

Her hevur ein í ár valt at hava eitt ávíst evni til hvørt møti, út frá tí sum er høvuðsyvirskriftin yvir alt tiltakið.

Fríggjakvøldið fer soleiðis Alfred Olsen av Toftum at tosa um evnið »Vit fingu eini gleðiboð at hoyra«, og leygarkvøldið Niels Jacob Nielsen av Strondum um evnið »Vit fingu eini gleðiboð at eiga«, meðan Alfred Petersen úr Havn sunnukvøldið fer at tosa um evnið »Vit fingu eini gleðiboð at bera«.

Í Heimamissiónini er eitt ríkt sang- og tónleikalív, og fara kór, bólkar, solistar og onnur at seta sín serstaka dám á øll tiltøkini um vikuskiftið.

Hesi tiltøkini eru fyri alla familjuna, og tí verður eisini skipað fyri barnaansing undir tiltøkunum.




# Hálv milliard í reyðum tølum

**Fyrstu framskrivingarnar til fíggjarlógararbeiðið fyri 2006 vísa, at talan er um hall, sum er úti við hálva milliard**

FÍGGJARLÓGARSMÍÐ
*Jákup Mørk*

Í Fíggjarmálaráðnum eru tey nú farin undir smíðið av fíggjarlógini fyri komandi ár, og líkt er til, at talan aftur í ár verður um stóra uppgávu, um alt skal hanga saman.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður sigur, at framskrivingarnar siga, at talan verður um eitt hall, sum er einastaðni millum 400 og 500 mió kr.

– Men hetta er so útgangsstøðið, og í so máta er støðan óbroytt í mun til undanfarnu fíggjarárini. Bæði fyri 2005 og 2004 byrjaðu vit jú við eini fíggjarlóg, sum sýndi eini 400 mió kr. í halli. Síðani varð raðfest av nýggjum, rationaliseringar og niðurskerjingar framdar o.s.fr., og tær ferðirnar megnaðu vit so at fáa eina fíggjarlóg, har hallið varð avmarkað.

– Og tað er tann parturin av arbeiðinum, sum nú er eftir. Tað er so sjálvandi eisinin tann størsti parturin, og fyrr enn tað er komið nakað væl áleiðis, ber illa at siga nakað um, hvussu endaliga fíggjarlógin kemur at síggja út staðfestir landsstýrismaðurin.